SOSIALURIN

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 1820
Tórshavn

Blaðstjórn:
Torfinn Smith (ábyrgd)
Hanna Lisberg

Tað er ikki loyvt at avfotografera lýsingar og myndir úr »Sosialinum« til nýtslu í øðrum bløðum uttan loyvi frá ábyrgdarblaðstjóranum.

Vildu teir hýsa honum og hann vitjaði teir kortini ikki ...?

FYRI sløkum mánaða síðani undir donsku statsministaravitjan ini kyknaði upp løgin »politisk debat«, einamest í andstøðubløðunum, men eisini í autoriseraðu meiningaverksmiðju okkara, Útvarpinum, og henda »debatt« tykist vinda herviliga uppá seg aftur, nú onnur mæt donsk politikaravitjan er væntandi, nevniliga fyrisæti danska Fólkatingsins.

HVATsnúði og snýr hesin orðaleikur andstøðuflokka, Tingakrossar og Útvarpsins seg tá um: Royna teir eftir førimuni at argumentera og kommentera? Gjørdu teir við knúsandi prógførslu orð statsmálaráðharrans til einkis? Nei, vælsignað! Teir bjóðaðu næstan ikki til at viðgera *tað, hann segði,* men tjakið og álopsgreinirnar koncentreraðu seg um, hvar hann fór, hvønn hann tosaði við, hvønn hann vitjaði, hvørjum hann át saman við, dansaði við og einamest um, hvar *hann búði,* meðan hann var her í Føroyum.

SO absurdur er politiski sjálvstýrissjónleikurin nú vorðin!

ER tað øvundsjúka ella bara vanligur politiskur naivitetur, at tað

ikki hóvaði sonevndum sjálvstýrismonnum, at statsministarin dvaldist hjá Ríkisumboðsmanninum, meðan hann var her(sic)?

ikki líkaði teimum, at hann vitjaði danskar stovnar her á landi?

ikki fall í góða jørð, at teir »nationalu« fyri eina ferð skyld komu at standa *nakað* aftarliga í receptións-køini?

ikki var dámt, at hann lurtaði eftir donskum symfoniorkestri etc...

VILJA »sjálvstýrismenn«, sum táið kongavitjanir eru, sleppa nærri framat einum donskum statsministara, er tað gaman í — Baunsgaard mundi bara valla gruna tað; og eingin landsstýrismaður hevði hoyrt grett, at nakar føroyingur vildi hýsa honum.


ILT er at trúgva, at alt hitt sonevnda sjálvstýrisliðið er so barnsligt, at teir veruliga hava nakran áhuga av, hvar ein danskur statsministari ferðast, svevur, etur ella spákar, meðan hann er her — vit onnur halda tað, ið hvussu so er, hava lítið annað enn selskapiliga interessu! Vit hefta okkum meira við, hvat hann sigur!
MEN tað skerst ikki burtur, atnógvir danskir stovnar og hús *eru* bygd í Føroyum seinnu árini og løgið var, um Baunsgaard gekk blundandi fram við teimum.

ENDILIGA er í flestu førum alheims-kutyma, fólkalig manna gongd, at statsmaður, sum kemur fremmandavitjan býr í síni »egnu« ambassadu, og Ríkisumboðsmannahúsini eru at rokna sum dansk ambassadan her. *At* Baunsgaard búði har og sat væl hjá Ríkisumboðsmanninum, sum so mangur heimamaður hevur, er einans komplimentur til Føroyska Heimastýrið, tí hvar skuldi hann annars búleikast enn hjá sínum egnu? Ella eigur hann at troðka seg inn hjá onkrum sjálvstýrismanni?

NAKAÐ annað er, um teir, sum bjóðað hava, eitt nú løgmaður privat vildi hava statsministaran sum gest og hýsa hon um, men hetta fer at vera ein »privat affæra« Krisjans Djurhuusar og Hilmar Baunsgaardar ímillum. Vit onnur kunnu ikki blanda okkum uppí tað! Møguliga er borðfæ Krisjans uppi!

TAÐ sindrið, sum eftiri er, táið slíkt fjákut andstøðutjak er analyserað, er bert hin óhugnaligi illgruni, at tað er einans øvundsjúkan, sum bagir, soleiðis at skilja, at »sjálvbjargnismenn« søkja sítt martyrium og altíð finna sær sín (Tinga)-»kross« at bera: Set nú fyri, at Baunsgaard baraa vitjaði føroyskar stovnar og partú vildi gista á Sjómansheiminum, ella hjá Sigurði Simonsen — hevði tá ikki alt hitt ønskriliga, »forfylgda sjálvstýriskórið« gramt seg um, hcussu ófólkalga hann gjørdi seg inn á føroyska umsiting, tók vistarpláss frá føroyingum etc. og spurt, hví í Guðs garði hann ikki heldur kundi búð hjá Ríkisumboðsmanninum!

UM sjálvstýrislogikkurin fyri eina ferð skyld hvørki er hyklériskur ella hysteriskur, vita fólk væl, hvør næstu ferð skal hýsa donskum statsheysi!



Skip	Úr København	Úr Aalborg	Úr Halmstad	Úr Leith	Í Føroyum
BELLATRIX		15.7.			19.7.
Norðvikingur	17.7.				21.7.
BLIKUR	24.7.	21.7.			27.7.
BELLATRIX		28.7.	29.7.		4.8.
Norðvikingur	30.7.				3.8.
BLIKUR	7.8.	4.8.			10.8.

PF SKIPAFELAGIÐ FØROYAR


Lýsið í Sosialinum

Dagbókin


FØÐINGARDAGAR

Mánadagin 20. juli fyllir Jóan Karl Eriksen, Kósini, Klaksvík, 83 ár.

Týsdagin 21. juli fyllir Jens Hansen, Klaksvík, 68 ár.







NORRØN VÍSUSANGARASTEVNA

KLAKKSVÍK: Í ÍTRÓTTARHØLLINI, hósdagin 23 juli kl. 20

TÓRSHAVN: Í LÆRARASKÚLAHØLLINI

NOREG
Lillebjørn Nielsen
SVØRÍKI
Fred Akerstrøm
ÍSLANDI
Sigriður Magnusdóttir
DANMARK
Kjeld Ingrisch
FØROYUM
Annika Hoydal

Fríggjadagin 24. juli kl. 20
Leygardagin 25. juli kl. 20
Sunnudagin 26. juli kl. 20

Søla av atgongumerkjum:
Tórshavn frá mánadegi 20. juli í SIMME MUSIKKHÚSI
kl. 9—17.30 telf. 2625


Fred Akerstrøm

Kostnaður:
Vaksin kr. 10,—
Børn kr. 7,—

Klaksvík frá leygardegi 18. juli hjá
Jonhard Larsen telf. 5209
Hans Jacobsen telf. 5059

Allar inntøkur av stevnuni fara til frama fyri arbeiðið hjá *Annesty International.*


Annika Hoydal